# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# ØLL AKTA FÓLKAFLOKKIN

Vit hava hoyrt tað fyrr: »*Samgongan er ikki arbeiðsfør*«. Hetta staðfesti Aksel Johannesen, fíggjarmálaráðharri og landsstýrismaður í fíggjarmálum í Degi og Viku í gjárkvøldið. Og at søgan endurtekur seg, tað váttaði Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, sum loksins í gjárkvøldið staðfesti, at Fólkaflokkurin ikki tekur undir við landsstýrissemjuni um fíggjarkarm.

Um tað so eru landsstýrifólkini hjá Jørgeni, sum ikki hava aktað harraboð, ella um hetta er nýggja mannagongdin í Fólkaflokkinum, nú formaður floksins ikki longur er í landsstýrinum, tað er eitt sindur ógreitt. Men sambært Akseli Johannesen, so varð semja á landsstýrisfundi mánakvøldið um fíggjarkarmin. Jørgen Niclasen er sum kunnugt ikki longur landsstýrismaður – men okkurt bendir á, at Annika Olsen og Jacob Vestergaard ikki drógu somu línu sum Jørgen Niclasen mánakvøldið.

Líkist ikki sørt einari parodi, sum ikki tykist enda. Framvegis er stríðsmálið serskattaskipanir til ávísar bólkar av føroyskum monnum, sum Fólkaflokkurin ikki vil sleppa, og so tilfeingisgjaldið. Vit hava sagt tað fleiri ferðir fyrr, at so leingi Fólkaflokkurin er í samgongu, so verður eingin broyting. Hvørki Sambandsflokkurin er ella Javnaðarflokkurin – og ei heldur Tjóðveldi, tora at gera Fólkaflokkinum ímóti.

Hetta hevur søgan víst. Fólkaflokkurin hevur sitið í samgongu í 17 av teimum seinastu 20 árunum, og hann hevur verið so sterkur, at eingin floksleiðari hevur torað at gjørt honum ímóti: Hvørki Edmund Joensen, Høgni Hoydal ella Jóannes Eidesgaard hava megnað ella torað at sett Fólkaflokkinum stólin fyri hurðina. Tann sterki leiðarin, hjá Fólkaflokkinum var Anfinn Kallsberg. Síðani Jørgen Niclasen tók yvir, hevur hann styrkt seg við at fara úr frá sum landsstýrismaður.

Vit sóu tað í fjør, at tað bar til hjá Fólkaflokkinum at halda seg uttan fyri semjuna um fíggjarkarmin, og søgan endurtekur seg í ár.

Jørgen Niclasen tykist hava



sama takið á samgongufeløgunum, sum Anfinn Kallsberg, men hann hevur í ávísan mist takið á sínum egna flokki, sum syndrast.

Sjálvandi skulu vit vísa hógv í búskaparmálum. Men vit spara okkum ikki einans úr fíggjarkreppuni, og tað almenna eigur sjálvandi sína ábyrgd at hava virksemi í gongd í landinum, tí mugu politikarar ikki stara seg blindar upp á eitt hvørvandi hall á fíggjarlógini í 2015.

Aksel V. Johannesen kann nú prógva sítt virði, sum nýggjur floksleiðari. Hann kann prógva, um eisini hann ræðist Fólkaflokkin, tað verður hansara politiska sveinastykki.

## Ræðist Aksel V. Johannesen eisini Fólkaflokkin?

# Útsølan hjá Kringvarpinum

Sjúrður Skaale, løgtingsmaður, hevur sett Helenu Dam á Neystabø ein grein 52 fyrispurning um lýsingar í Kringvarpinum. Hann spyr, hvat hon heldur um, at Kringvarp Føroya gerst støðugt meira ágangandi á lýsingarmarknaðinum, soleiðis sum eitt nú skriv, sum Kringvarpið sendi lýsingarstovunum 21. mars er tekin um. Hann spyr eisini, nær og hvussu landsstýriskvinnan fer at seta greiðari mørk fyri, hvussu Kringvarp Føroya kann fara fram í kappingini móti privatum fyritøkum á lýsingarmarknaðinum?

– Spurningurin um hvønn rætt Kringvarp Føroya skal hava á privata lýsingarmarknaðinum hevur ofta verið umrøddur. Tað er greitt at um KVF als ikki slapp at lýsa, so hevði hetta ikki bara verið ein smeitur fyri stovnin, men eisini fyri bæði lýsingarstovurnar, lurtarar og hyggjarar. Tí er eitt forboð neyvan rætti vegurin at fara.

Hinvegin er greitt, at KVF ikki púra ótálmað kann kappast móti privatum fyritøkum á tí marknaði, sum er sjálvt lívsgrundarlagið hjá hesum fyritøkum, sigur Sjúrður Skaale.

Hann sigur, at tað kortini tykist sum um, at KVF gerst støðugt meira ágangandi á marknaðinum. Eitt dømi um tað er niðanfyristandandi skriv, sum 21. mars varð sent lýsingarstovunum. Skrivið sýnir, at KVF nú fer inn í kappingina um teir smáu lýsararnar, sum higartil mest hava lýst í privatu miðlunum:

***»Tilboð upp á lýsingaframleiðslu***

*Til allar lýsingarstovurnar.*

*Kringvarpið ætlar at bjóða smáum lýsarum at fáa sjónvarps- og útvarpslýsingar framleiddar eftir ein ásettum leisti, og fyri ein fastan prís. Hetta, fyri at gera atgongdina til Kringvarpið lættari fyri teir smáu lýsararnar.*

*Vit vilja tí fegin biðja tykkum um prís uppá framleiðsluna av ávíkavist útvarps- og sjónvarpslýsingum, ið uppfylla niðanfyri standandi treytir:*

*Sum útgangsstøði ætla vit at halda lýsingarnar innanfyri 12 – 15 sekund, í mesta lagi 30 orð og til sjónvarpslýsingarnar í mesta lagi 3 vørur/myndir, umframt bakgrund og logo.*

*Her eru tvey dømi hvat slíkar lýsingar kundu havt av tekstinnihaldi:*

*"Í samband við ókeypis er at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin leygardagin, hava allir handlarnir í Klaksvík opið til kl. 22. Klaksvíkar Handilsfelag. Býurin við fjølbroytta úrvalinum fyri bæði børn og vaksin."*

*"Skósølan við Gøtugjógv. Hesa vikuna hava vit fingið nýggjar vetrar styvlar. Prísir úr 295,- kr. Eisini eru vælumtóktu gaggurnar frá Adidas aftur at fáa. Skósølan við Gøtugjógv – skógvar til alla familjuna."*

*Vinarliga lat okkum vita í seinasta lagi mánadagin 28. mars [hetta er seinni broytt til 7. apríl, SS)], hvat tit eru sinnað at gera hetta fyri, og send tað til umsitingarleiðaran Sannu Hansen – sanna@kringvarp.fo.*

*Um tit hava onkran spurning ella ivamál, so er bara at ringja ella senda mær ein teldupost.«*





## Karaktermorðið heldur fram

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 11



## Um æruna av hotspottum

LEVI MØRK
KJAK Á SÍÐU 33

# Posta í skrell

Á brennistøðini hjá IRF á Hagaleiti í Leirvík hava tey stórar trupulleikar av plastikkposanum hjá Posta. Trupulleikin er tann, at tá tey sortera pappír, so er tað av týdningi, at plastikk og pappír ikki verður blandað saman.

Pól Andrias Joensen, stjóri á brennistøðini hjá IRF segði herfyri við Kringvarpið, at tey hava ikki møguleika at tøma plastikkpakkarnar frá Posta, sum vit fáa mánakvøld og mikukvøld við lýsingum og ókeypis lýsingarbløðum. Hann segði, at eini 1.600 slíkir pakkar fara beinleiðis í skell uttan at verða lætnir upp.

Um vit gita, at støðan er nøkulunda tann sama í Havn, so fer ein stórur partur av lýsingunum og ókeypis lýsingarbløðunum beinleiðis í skrell uttan at fólk yvirhøvur hava latið pakkan upp – kanska eini 3-4.000. So eru eisini tey, sum lata pakkan um – men ikki lesa alt.

Henda lítla kanningin hjá Kringvarpinum vísir, at tað snýr seg ikki bara um at koma út í hvørt hús við reklamum og teimum bíligu ókeypis reklamubløðunum. Hetta er nakað, sum lýsarar við respekt fyri sær sjálvum og sum hugsa í málbólkum eiga at hava í huga – og nakað sum marknaðardeildirnar á dagbløðum sum eitt nú okkara blað eiga at gera sær dælt av!



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*